




Puntur nr. 9



# 0-90 km/t eftir 2 sekund

**Nýggjasti rutsjibanin í Tusindfryd parkini við Oslo brúkar heilt serliga tøkni, ið fær vognarnar at ferðast við 90 km/t eftir einans 2 sekund**

FERÐING

Síðan hon læt upp í 1988 hevur gleðisparkin við Oslo Tusindfryd, alsamt víðka um virksemið. Við 70 milliona íløguni í ár Speed Monster, er Tusindfryd vorðin ein garrvill uppliving. Speed Monster er ein púra ørur rutsjebani. Ein heilt serligur útskjótisteknikkur sendur vognarnar upp í 90 km/t ferð innan 2 sekund eru farin. Síðan drøna vognarnir gjøgnum eitt loop rundan um rullutrappurnar við inngondina til Tusindfryd, og síðan við enn meira ferð ígjøgnum enn eitt loop. Har eru skrúður, vektloysi og sera nógv g-megi, alt í alt ein uppliving, ið ikki er fyri sartar sálir.

Speed Monster er triðji rutsjibanin í Tusindfryd, ið eisini hevur ein klassiskan træ rutsjibana Thundercoaster, ið varð bygdur í 2001 og Loop-banan, ið er júst tað, ið navnið bendur á. Nýggi rutsjibanin Speed Monster varð tikin í nýtslu 23. apríl. Tá hevði man arbeitt við byggja hann í tvey ár. Longu fyrsta dagin slóg Tusindfryd øll met fyri tal av vitjandi, og restin av várinum hevur gingist á sama hátt. Hóast 70 milliónir norskar krónur er ein stór upphædd, so tykist hon fyribils at vera ein skilagóð íløga, við 23% fleiri vitjandi enn í fjør.

Hetta er tó nógv tann størsta íløgan hjá Tusindfryd, ið síðan byrjanina hevur brúkt 200 milliónir norskar krónur í íløgum til allar tær 35 ymisku upplivingarnar.

Tusindfryd bygdi í fjør eitt barnaland, Barnefryd, ið sera nógvar barnafamiljur nýta høvið at vitja. Her eru karrusellir, parisarahjól, bilar og annað í vendir sær til tey yngstu, umframt eitt økið, ið er væl egna til útferð.

Í 2000 víðkaði Tusindfryd virksemið rættiliga munandi við stórum svimjilandi, ið eitur Badefryd. Badefryd hevur ikki færri enn 3 stórar vatnrutsjibanar og góðar svimjihylar. Badefryd og Tusindfryd liggja inni á sama øki, so hóskandi er at fara í Badefryd mitt um dagin, tá hitastigini eru hægst, og síðan brúka fyrrapart og seinnapart í Tusindfryd.

Við Tusindfryd hevur Oslo fingið eina gleðispark, ið savnar útvið 450.000 vitjandi á hvørjum ári, her er bæði talan um Oslobúgvar og ferðandi úr inn og útlandi. Men við hækkanini av vitjandi í ár, fer talið kanska uppum tey 500 túsund.

Tusindfryd liggur 20 km uttan fyri Olso, og ferðin til Tusindfryd úr Oslo eitt korter við bili, eisini koyra bussar allan dagin beint úr Oslo til gleðisparkina.




